

*Vítt er til loft og veggja í Fríkirkjuni Oasan í Hoyvík. Eftir at virksemið so smátt er byrjað, verður nú av álvara lagt til brots eftir vígsluna 27. august*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Ein ljós og rúmlig oasa í høvuðsstaðnum

**Limirnir í fríkirkjuni Oasan í Hoyvík síggja við spenningi fram til leygardagin 27. august, tá kirkjubygningur teirra verður vígdur. Millum luttakararnar er Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri og gestir úr Noregi og Íslandi**

SAMKOMUR
*Snorri Brend*

**Hoyvík:** Eftir at hava húsast á ymiskum støðum seinastu árini, kann fríkirkjan Oasan nú síggja fram til dagin, tá tey kunnu taka sín egna kirkjubygning alment í nýtslu.

Fyri limirnar í samkomuni verður tískil leygardagurin 27. august ein heilt serstakur dagur.

Henda dagin verður nýggi bygningur teirra nevniliga vígdur. Og nú kunnu tey álvara fara til brots við missiónsarbeiði sínum innanveggja og aðrastaðir við.

Í samband við hesa vígsluna fara fyristøðumaðurin, Jóni Johannesen og mentamálaráðharrin, Jógvan á Lakjuni at tala, eins og nógvur sangur er á skránni.

- Vit eru sera fegin um henda nýggja og góða bygningin, vit hava fingið. Vónandi verður hann til signing fyri mong menniskju, sigur Jóni Johannesen.

Kirkjan sjálv er longu í brúki til gudstænastur, møtir og til barna- og ungdómsarbeiðið. Fyrsta møtið varð hildið her sunnudagin 5. juni, men ikki fyrrenn nú verður kirkjan altso vígd.

## Umfatandi skrá

Skráin fyri vígsluna av bygninginum er løgd og sær sera spennandi út. Umframt luttøku úr Føroyum koma eisini kend fólk úr Noreg og Íslandi at taka lut.

Vígsluhátíðin byrjar hóskvøldið 25. august, tá ungdómsmøti verður. Fríggjakvøldið verður stór gospelkonsert fyriskipað, har ein vendur sær bæði til tey eldru og til tey yngru.

Við hesa konsertina fer Finnur Hansen at syngja, umframt bólkin Proclaim og gospelkórið United Voices.

Sjálv vígslan verður leygardagin kl. 15, tá ein vígslugudstænasta verður á skránni har fyristøðumaðurin og mentamálaráð-harrin fara at tala.

Við hetta høvið fara eisini Torbjørn, Annika, Sigrið og onnur at syngja, eins og dansibólkurin Saltið hevur eina framførslu.

Eftir vígsluna verður kirkjan víst fram, og um kvøldið verður so møtið við tí eina útlendska gestinum. Tá fer nevniliga kendi Føroya-vinurin, Eivind Frøen úr Noregi at tala og ein manstrio úr Soli Deo Gloria í Klaksvík at syngja.

Sunnudagin 28. august verður so fyrst gudstænasta kl. 11, har Fridrik Schramm úr Íslendsku Kristskirkjuni talar og Ester, Jannet og onnur syngja.

Seinnapartin er sunnudagsskúli á skránni, har m.a. Absalon Áargarð og familja hansara luttaka.

Um kvøldið verður so aftur evangeliskt møti við Eivind Frøen, har Torbjørn, Annika, Sigrið og onnur syngja. Aftaná hetta møtið verður náttturði.

## Omanfyri 500 fólk

Nú samkoman hevur fingið góð og rúmlig høli til virksemið sítt, er ein faldari í gerð, har virksemið í og út frá samkomuni skal lýsast.

Hesin faldarin verður ætlandi prentaður í eini 4.000 eintøkum, og skal m.a. berast út í øll húsarhaldini í Hoyvík og helst aðrastaðni við.

Í tí stóra møtisalinum verður mett at eini 400 fólk kunnu sita. Í einum lítlum sali, sum skal avskildrast við faldiveggi, kunnu væl omanfyri 100 fólk sita.

Her er eisini ein nútíðar køkur, og tí ber til hjá samkomuni sjálvari at hava møtir og temadagar í tí eina salinum, meðan ein etur máltíðirnar í hinum.

## Flogferðir fyri ein bíligan penga

**Uppboð:** Í gjár og aftur í dag er møguleiki at fáa ein bíligan ferðaseðil við Atlantsflogi á leiðini millum Føroyar og Edinburgh. Byrjunarprísurin var bert 1 kr.

Felagið hevur nevniliga skipað fyri einari uppboðssølu á netinum, har ein og hvør kann bjóða uppá hesar 28 ferðaseðlarnar – 14 hvønn dagin.

Uppboðssølan byrjaði í gjáramorgunin kl. 9, tá tann fyrsti ferðaseðilin varð seldur fyri 635 kr. Hálvan tíma seinni byrjaði uppboðið uppá tann næsta seðilin og fór hann fyri 475. Hetta vóru samstundis hægsti og minsti prísur á hesar ferðaseðlarnar til fráferðina komandi leygardag.

Beint áðrenn evstamark okkara í gjár kl. 12:30 fór tann eini ferðaseðilin fyri 575 kr.

Og soleiðis varð hildið á allan gjár fram til kl. 16, og soleiðis verður eisini gjørt í dag, frá kl. 9 til 16.

**sb.**

## Flest óhapp millum kl. 14 og 17

**Ferðsla:** Eitt yvirlit frá Landsverki vísir, at flestu ferðsluóhappini í fjør á føroysku vegunum hendu seinnapart á degi.

Eftir hesum at døma, so henda omanfyri 90 ferðsluóhapp millum kl. 14 og 15, meðan talið hækkar munandi í tímanum millum kl. 16 og 17, tá nærum 100 ferðsluóhapp eru íalt, bæði tá talan er um landsvegir og kommunalar vegir.

Yvirlitið vísir eisini, at eitt rættiliga stórt tal av ferðsluóhappum henda millum kl. 11 og 12, meðan eitt lutvíst lítið tal av ferðsluóhappum henda um morgunin, tá fólk fer til arbeiðis og børn í skúla.

Sambært hesum hendu einans 15 ferðsluóhapp í hesum tímanum, tá bæði vaksin og børn flest fara frá húsum.

**sb.**

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo